

## Næsta útgávan

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

Nik & Jay arbeiða í løtuni við eini øðrvísi útgávu. Við egna felagnum Nexus fara teir, í samstarvi við Joey Moe og Jinks, at gera eina EP-útgávu við sjey løgum, sum bert fer at vera til keyps á netinum – ikki í handlunum.

Innan komandi vikuna verða hesi nýggju løgini at hoyra á you-tube, og tónleikurin fer at kunna keypast á netinum fáar dagar eftir, at Nik & Jay hava verið í Føroyum.

Nik & Jay eru rættiliga loyndarfullir, og vilja ikki avdúka serliga nógv um hesa útgávuna, sum fer at eita xtra. Navnið kemst av, at teir hava so nógv eyka tilfar, sum bara skal út nú.

– Vit ætla ikki at marknaðarføra nakað serligt. Vit fara bara at leggja hetta á netið, og so má tað breiða seg sum tað vil, greiðir Jay frá.

Hetta er tískil ikki ein rættilig fløga -meiri ein roynd, har teir hava spælt sær í studio og roynt okkurt nýtt.

Hetta verða tey sjey løgini á EP'ini. Í parentes eru teir, ið hava gjørt løgini:

Xtra Vol. 1
1. Yo-Yo pt. 2 (Joey Moe, Jinks, Nik &Jay)
2. Hulahop (Joey Moe, Nik & Jay)
3. [dai] To The Beat (Jinks)
4. Xtranummer (Nik & Jay)
5. Grib Natten (Joey Moe)
6. In The [hæd] (Jinks)
7. Drømmemusik (Nik & Jay)



# Det' hot!

Sólin bakaði niður yvir tey 25.000 fólkini, sum vóru savnað í Brøndby til "Vi Rocker" tiltakið, sum Nik & Jay framførdu á 27. juni. Beint eftir at eg hevði prátað við teir, skuldu teir á pallin, og fólk bíðaðu ótolin.

Tá pallstjórin presenteraði teir hoyrdist eitt brøl frá stóru mannamúgvuni, og serliga ungu konufólkini trokaðu fyri at sleppa eitt vet nærri pallinum og stóru fyrimyndunum. Fleiri høvdu skrivað Nik ella Jay í andlitið.

Teir hava havt ótallig hitt ígjøgnum árini, og at teir framvegis eru vælumtóktir var eingin ivi um. Fólk sungu við, summi bert niðurlagið, meðan fleiri dugdu allar rapptekstirnar á tamb.

Óansæð aldur vaggaðu mjadnarnar á fólki við til rútmurnar, og hóast Nik & Jay kanska ikki hava heimsins djúpastu tekstir, so blivu fólk í góðum lag, og summarstemningurin var í topp til løg sum "Boing-boing", "Lække" og "Hot".

Teir lovaðu eina fest, og ein fest var tað av sonnum.

